# Vilja ikki koppsetast

Eins og í fleiri øðrum londum aftra nógv fólk í Bretlandi seg við at lata seg koppseta ímóti H1N1 ella Influensa A. Tíðarritið Pulse skrivar, at umleið helmingurin av teimum, sum hava fingið tilboð um koppseting, hava sagt nei takk. Sambært læknum, sum tíðarritið hevur tosað við, hava bara 46 prosent sagt ja takk. Summi taka ikki av, tí tey eru bangin fyri hjáárinum, meðan onnur halda tað vera óneyðugt at lata seg koppseta. Serliga kvinnur, sum eru við barn, aftra seg við at lata seg koppseta.



# Afturlating útsett

Fyri fyrstu ferð hevur amerikanski forsetun, Barack Obama, ásannað, at fangalegan í Guantanao í Kuba verður ikkii latin aftur um tveir mánaðir sum ætlað. Undir valstríðnum í fjør segði Obama, at bleiv hann forseti, fór hann at lata leguna aftur í januar í 2010, men á tíðindafundi í Suðurkorea í gjárkvøldið ásannaði hann, at tann tíðarætlanin fer ikki at halda. Enn eru 220 fangar í Guantanamo-leguni, men USA hevur havt trupulleikar við at finna lond, sum vilja taka ímóti teimum. Tí verður kannað, um tað ber til at flyta teir seinastu fangarnar til eitt fongsul í sjuálvum USA, skrivar Reuters.



*Størstu einstøku nøgdirnar, sum Fiskamarknaður Føroya seldi í gjár, vóru toskur 3 og 4*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# FMF selir nú mest av toski

**Tá hugt verður at tølum yvir søluna á Fiskamarknaði Føroya, sæst skjótt, at størstu einstaku nøgdirnar, sum seldar verða um marknaðin, er toskur, serliga toskur 3 og 4**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Ivaleyst vildi onkur sagt, at vit eiga ikki at veiða so stórar nøgdir av toski 3 og 4, sum vísir seg at vera týdningarmesta veiðan hjá skipum og bátum í løtuni.

Men hetta er sjálvsagt lættari sagt enn gjørt, og soleiðis hevur altíð verið við tí, sum í havinum svimur.

Í aðrar mátar kunnu vit fegnast um, at smáur toskur aftur hevur so stóran týdning í veiðini hjá skipum og bátum eftir nøkur ár, har toskaveiðan hevur verið av tí lakasta.

Nøkur ár herfyri var upsin eisini óvanliga smáur, men eftirtíðin hevur ikki víst, at veiðan, sum var hesi árini, gjørdi enda á upsastovninum fyri tann skuld.

Vit skulu tó ongar samanberingar gera millum hesi bæði fiskasløgini, tí tey annars eru so ymisk.

## Sølur hjá FMF

Fiskamarknaður Føroya seldi í gjár stívliga 320 tons á uppboðssølu, og aftur í gjár vóru størstu einstøku nøgdirnar toskur 3 og 4.

Toskur 3 fór fyri miðalprísin 14,28 krónur fyri kilo og toskur 4 fyri miðalprísin 9,45.

Stívliga 13,7 tons vóru av toski 2, sum fór fyri miðalprísin 22,59 krónur fyri kilo.

Besta hýsan í gjár – hýsa 1 – fór fyri miðalprísin 11,79.

Stívliga 20 tons vórðu seld av hýsu 2, og hendan fór fyri 10,47 krónur í miðal fyri kilo.

## Hægst og lægst

Hægsti prísur var fyri 1.050 pund av kalva 2, sum fór fyri 64 krónur fyri kilo.

Lægsti prísur var fyri nøkur fá kilo av skrubbu, sum fóru fyri 1,90 krónur fyri kilo.

Góð 30 tons vóru eisini av kongafiski 2, og her var miðalprísurin 9,37.

Miðalprísurin fyri øll fiskasløgini var 11,49 krónur fyri kilo.

# Kongshavn hevur landað 33.900 tons

**Við endan av oktober mánaða hevði landingarmiðstøðin Kongshavn í Saltangará landað heili 5.600 tons fleiri í ár enn somu tíð í fjør. Nógv meira er landað í ár av bæði upsa og gulllaksi**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

33.900 tons.

Tað er nøgdin, sum fram til endan av oktober í ár varð landað á landingarmiðstøðini Kongshavn í Saltangará.

Hetta er eini 5.600 tons fleiri enn somu tíð í fjør.

Upsaveiðan var sera góð í byrjanini av hesum árinum, og tá gulllaksatíðin byrjaði í apríl og helt fram til út á heystið, royndist henda veiðan eisini av tí allar besta.

Í fjør landaði Kongshavn tilsamans 6.800 tons av gulllaksi, meðan samlaðu nøgdirnar av gulllaksi í ár vóru heili 9.400 tons.

Onnur fiskasløg taldu tilsamans 21.500 tons fram til endan av oktober í fjør, men í ár taldu hesi 24.500 tons.

## Góð veiða

Vøksturin á 5.600 tons stavar soleiðis bæði frá meira gulllaksi – umframt nøgdunum av øðrum fiskasløgum, har upsin sjálvsagt er nógv tann størsti parturin.

Upsaveiðan í heyst hevur ikki verið nakað serlig. Onkrir túrar hjá partrolarunum hava verið hampiligir, men sum heild hevur upsaveiðan verið lakari í heyst enn í fjør heyst.

Í oktober í ár landaði Kongshavn soleiðis eini 150 tons færri av upsa enn í oktober í fjør.





## Góð byrjan

Taka vit hinvegin januar mánaða í fjør, var samlaða nøgdin 1.600 tons. Í januar mánaða í ár var hon sløk 3.000 tons.

Sum vit nevndu, var tað serliga byrjanini av árinum,

# Seks skip í Saltangará

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fyrr í hesi vikuni landaðu fýra ísfiskatrolarar í Saltangará. Skipini vóru Stelkur og Bakur, sum høvdu 284.000 pund og Rókur og Lerkur høvdu umleið somu nøgd – ella eini 280.000 pund. Meginparturin av veiðini var upsi.

Landingarmiðstøðin Kongshavn í Saltangará visti í gjár at siga, at Heykur og Falkur helst koma inn at landa í dag ella í morgin.

Samanborið við árið í fjør, hevur landingarmiðstøðin Kongshavn landað nógv fleiri tons higartil í ár enn somu tíð í fjør.

Hetta kunnu lesarar lesa um í aðrari grein á hesi opnu.



*Landingarmiðstøðin Kongshavn fer at landa seks trolarar hesa vikuna*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*